# Jógvan við Keldu hevur fulla undirtøku

**– Tað kemur óvart á løgmann, at hondbóltsfeløgini seta útlendingamálið so skarpt upp, at tey beinleiðis hótta við at niðurleggja landskappingina í vetur**



*– Jógvan við Keldur hevur fingið undirtøku frá samgonguni til at seta loysnina í útlendingamálinum í verk, sigur løgmaður. Hann er verji hjá ítrottinum, men vil ikki lova, at málið verður tikið uppaftur*

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

At ítróttarfeløgini sjálvi mugu betala útendskum ítróttarfólkum 52% av eini arbeiðaraløn, er ein loysn, sum samgongan hevur stuðlað.

Tað sigur Jóanes Eidesgaard.

Hann er ikki bara løgmaður. Hann er eisini verji hjá føroyska ítróttinum. Tí hava vit spurt hann um hann góðtekur, at nógv umstrídda útlendingamálið hevur fingið eina loysn, sum er so vánalig fyri ítróttarfeløgini, at tey beinleiðis hava hótt við at niðurleggja landskappingna í vetur.

Hetta boðaði ein talsmaður fyri hondbóltin frá í Degi og Viku fríggjakvøldið.

Onki er at ivast í, at flogbólturin er í nøkunlunda somu støðu, tí har eru eisini nógvir útlendingar, hóast flogbólturin í seinastuni ikki hevur gjørt so ítøkiligavart við seg sum hondbólturin.

### Undirtøku í samgonguni

Løgmaður váttar, at øll samgongan hevur tikið undir við loysnini, sum Jógvan við Keldu, hevur funnið á málinum.

– Landsstýrismaðurin í innleindismálum hevur spurt seg fyri í samgonguni og har hevur hann fingið undirtøku fyri at seta hesa loysnina í verk. Útfrá hesum er loysnin sostatt sett í verk.

– Tí hava vit eisini gingið út frá, at innanlendismálaráðið hevur syrgt fyri, at talan er um eina loysn, sum er brúkilig.

Í stuttum ber loysnin í sær, at fáa ítróttarfeløg útlendingar at spæla, skulu feløgini sjálvi betala minst 52% av eini arbeiðaraløn.

Hini 48% av lønini kunnu tey so vinna hjá øðrum arbeiðsgevarum.

– Hetta snúði seg fyrst og fremst um at fáa málið avgreitt. Tað hevur ligið í óvissu í langa tíð og sostatt hevði tað stóran týdning fyri ítróttin, at hann fekk greitt at vita, hvørjar reglur skulu vera galdandi, so at feløgini kundu taka støðu til sáttmálarnar fyri veturin. Men løgmaður sigur samstundis, at tað kemur óvart á hann, at hondbóltsfeløgini hava tikið so illa ímóti hesi loysnini, at tey hótta við at niðurleggja landskappingina í vetur.

– Eg minnist, at mótmælini vóru eisini mong, tá ið fótbóltskappingin byrjaði. Tá hótti Skála við at taka seg úr kappingini, men hóast tað, hava teir ligið fremst ein stóran part av árinum og teir liggja enn heilt frammi í oddinum.

### Snýr seg ikki bara um ítrótt

Løgmaður sigur, at hann hevur ikki havt møguleika til at vera í sambandi við ítróttin so hann veit ikki í smálutum, hvat býr aftanfyri ónøgdina.

– Og ítrótturin hevur ikki sett seg í samband við meg.

– Men tá ið ítróttarfeløgini seta málið so skarpt upp, er sjálvsagt okkurt í tí, leggur hann afturat.

– Og er málið so álvarsligt, sum tey siga, vænti eg at feløgini sjálvi fara at seta seg í samband við meg.

Løgmaður sigur at tað, at ítróttarfeløgini eru so ónøgd við loysnina, er ein nýggjur vinkul í málinum, sum hann ikki hevur havt møguleika fyri at viðgera, hvørki við ítróttarfeløgini, ella við Jógvan við Keldu.

*Men kann tað henda, at málið verður tikið uppaftur, skuldi tað hent, at ítróttarfeløgini venda sær til tín sum løgmann og verja fyri ítróttin?*

– Tað veit eg ikki! Hetta er ikki eitt mál, sum snýr seg um ítróttin einsamallan. Hetta er eisini eitt mál, ið snýr seg um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum sum heild, og tí hava vit eisini føroysku arbeiðsmegina at hugsa um. Øðrumegin skulu vit hugsa um, at tað skal bera til hjá føroyskum ítróttarfeløgum at hava útlendsk ítróttarfólk. Men vit hinvegin eisini hugsa um, at føroyska arbeiðsmegin skal hava atgongd til tey arbeiðspláss, sum eru í landinum.

– Vit hesi loysnini hava vit roynt at funnið eina javnvág.

### Alt telur við

Løgmaður vísur eisini á, at ítróttarfeløgini kunnu rokna útreiðslur, sum tey hava av útlendsku ítróttarfólkunum, upp í lønina.

– Tá ið feløgini skulu betala útlendsku ítróttarfeløgunum 52% av eini arbeiðaraløn, kunnu útreiðslur til íbúð, ferðing og annað, roknast upp í.

Løgmaður heldur, at júst hendan skipanin skuldi gjørt tað munandi løttari hjá feløgunum.

Skulu ítróttarfólkini hava 48% av lønini frá vanligum arbeiðsgevarum, ber tað í sær, at feløgini finna arbeiðsgevarar, sum eru sinnaðir at seta fólk hálva tíð.

Og júst hetta meta feløgini er ein stórur trupulleiki, tí arbeiðsgevarar vilja bara hava fólk fulla tíð.

Men her er løgmaður ikki samdur.

– Vinnulívið kring landið er sera lagaligt og strekkir seg ógvuliga langt fyri at stuðla ítróttarfeløgunum í økinum.

Tí væntar løgmaður, at tað fer at bera til at finna útlendsku ítróttarfólkunum parttíðar arbeiði á virkjum av ymsum slagi.

Her tosa løgmaður eisini av egnum royndum, tí hann var formaður í TB í 1980, tá ið tvøramenn blivu Føroyameistarar - við útlendingum á liðnum, sum eisini arbeiddu í privatu vinnuni.

– Og tað er eisini nakað nógv kravt, at ítróttarfeløgini skulu kunna fáa útlendsk ítróttarfólk at spæla fyri seg, uttan at tað skal kosta teimum nakað helst, sigur løgmaður.

# Fara at dansa í Suðuroynni

**Leygarkvøldið verður føroysk dansinátt í Øravík, har har nógv fólk plaga at koma saman**

FØROYSKIR DANSUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Leygarkvøldið verður gistingarhúsið í Øravík karmur um eitt stórt tiltak fyri øll, sum hava áhugað fyri føroyskum dansi*

Leygarkvøldið verður stórt tiltak í Suðuroy fyri øll tey mongu kring landið, sum hava áhuga fyri føroyskum dansi.

Tá verður nevniliga skipað fyri eini føroyskari dansinátt á gistingarhúsinum í Øravík.

Nú í nøkur ár hava dansifeløgini í Suðuroy, skipað fyri eini føroyskari dansinátt á hásumri og har plaga heilt nógv fólk at vera við, eisini norðaneftir.

Og í ár verður dansináttin sostatt leygarkvøldið.

Av tí, at tiltakið er á gistingarhúsinum, fáast møguleikarnir at gista, ikki betri og tey, sum ikki hava hug at bíða til kvøldtúrin sunnukvøldið, kunnu fara norður við Smyrli longu klokkan sjey á morgni.

Dansináttin byrjar við borðhaldið klokkan 20, har borðreitt verður við heitum mati við eplum, sós, salati og onkrum góðum omaná.

Og so verður dansað alla náttina.

Alt tiltakið kostar 180 krónur.



# Petur farin til Danmarkar

**Lítli Petur fór til Danmarkar mánamorgunin. Hóast roynt varð til tað seinasta frá føroyskari síðu at fáa Karup Kommunu at taka avgerð sína aftur, varð hetta av ongum. Drongurin fer nú á stovn í Danmark**

LÍTLI PETUR
*Edvard Joensen*



*Saman við starvsfólki á Føroya barnaheimi fór Lítli Petur umborð á Maersk Air flogfarið í Vágum mánadagin*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Lítli Petur er farin til Danmarkar á stovn. Endaliga avgerðin varð latin føroyskum myndugleikum mánamorgunin.

Við flogfarinum hjá Maersk Air, sum fór til Billund fyrrapartin mánadagin, var Lítli Petur millum ferðafólkini. Hann fór saman við starvsfólkum á Barnaheiminum til Danmarkar, har hann skal búgva á stovni fyri børn við atferðartrupulleikum.



*Ein seinasta heilsa til familjuna, sum var á flogvøllinum og segði farvæl*

*Mynd: Edvard Joensen*

—Hetta er sera tungt hjá okkum í familjuni, segði mammubeiggi Peturs, Vilhelm Hendrik í Skálanum, tá Sosialurin hitti hann á flogvøllinum mánadagin. Vit eru hørm um støðuna, men noyðast at ásanna, at vit einki fáa gjørt, sum nú er.

Hann sigur seg undrast á, at familjan ikki hevur fingið hesa avgerðina greitt at vita fyrr, tí ymiskt er, sum bendir á, at hon er tikin fyri umleið einum mánað síðan ella so. Men alla hesa tíðina hava avvarðandi føroyskir myndugleikar líkasum latið skilt, at tað helst fór at bera til at broyta hana, hóast teir vistu, at tað ikki bar til, sigur mamubeiggin at Peturi.

Hann var saman við eini mostur at dreinginum og øðrum í familjuni í Vágum og segði Peturi farvæl.

—Væntandi verður sambandið millum Petur og fmailjuna í Føroyum nú veikari, enn tað hevur verið. Og okkurt bendir á, at nú Petur er farin til Danmarkar, verðut tað helst til, at systrar hansara eisini fara til Danmarkar at búgva, sigur Vilhelm Hendrik í Skálanum.

Roynt hevur verið til allarseinasta at fáa broytt avgerðina hjá Karup Kommunu, soleiðis at Petur kundi verða verandi í Føroyum. Men úr Almanna- og Heilsumálaráðnum verður sagt, at svarið, sum Karup Kommuna sendi ráðnum mánamorgunin, er sera greitt, og at grundgivið er fyri avgerðini soleiðis, at tað ber ikki til at misskilja hana.

Foreldrarætturin til dreingin er hjá pápanum, sum býr í Karup Kommunu, og tískil eigur Petur at vera í Danmark, sigur løgfrøðin.

Í Føroyum hevur ein áhugabólkur arbeitt hart fyri at fáa broytt avgerðina soleiðis, at drongurin ikki varð sendur til Dnamarkar. Fundur var við løgman seint sunnukvøldið, men úrlsitið er tað sama. Løgfrøðin sigur sítt, og hon kann ikki broytast sleiðis í eini handavend. Og tilboð til børn við tí tørvi, Petur eftir myndugleikanna meting hevur, eru ikki í Føroyum.

Aðrastaðni á síðuni er prentað kunningarskrivið, sum Almanna- og Heilsumálaráðið hevur sent út í samband við avgerðina um at senda Petur til Danmarkar.



*Lagið var ikki gott, tá komið var til, at farast skuldi umborð*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Renna eftir flogferð

**Leygardagin verður møguleiki fyri at vinna eina flogferð, um tú orkar at renna á fjøllunum. Tá fer Sandavágs Ítróttarfelag at skipa fyri fjallarenning**

SUMMARTILTAK
*Edvard Joensen*



*Tað er lætt at koma niðan á Húsafelli, og útsýni er frálíkt*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Verður tú fyrstur at renna úr Sandavági niðan á Húsafelli og oman aftur, vinnur tú eina flogferð.

Sandavágs Ítróttarfelag fer leygardagin at skipa fyri einum summartiltaki í Sandavági, har eitt av tiltøkunum verður ein sonevnd fjallarenning, har luttakararnir fara at kappast um at vera fyrstir at renna - ella ganga - frá SÍF-húsinum niðan á Húsafelli oman fyri sandavág og aftur til SÍF-húsið, har málið er. Tann, sum fyrstur verður aftur á mál, vinnur eina flogferð til Danmarkar.

Húsafelli er 591 metrar høgt, men væl vallaður hagi er allan vegin niðan, og lætt er at koma niðaná.

Fyri at ansa eftir, at tey, sum luttaka, veruliga hava verið á fjallinum, verður fólk har uppi, sum fer at geva teimum, ið koma niðan, eitt frámerki sum prógv um, at tey hava verið har uppi. Eisini fer at verða samband millum fjalli og málið, soleiðis, at fólk á málinum kunnu fáa fráboðanir um, hvussu støðan í kappingini er.

Fjallarenningin er eitt av mongum tiltøkum, sum ætlandi verða á skránni hendan dagin, siga tey, sum skipa fyri. Endaliga skráin er tó ikki løgd enn.

Tilmelding til fjallarenningina er á tlf. 33 38 43. Byrjað verður frá SÍF-húsinum leygardagin klokkan 17.00. Til ber eisini at melda til á staðnum ein tíma áðrenn byrjað verður.

Tiltakið er fyri øll, sum halda seg til. Bæði børn og vaksin. Luttøkugjaldið er kr.100,-. Men so er eisini ein góður vinningur at kappast um.

Frá Almanna- og Heilsumálaráðnum:

## Kunning um aftursvar frá Karup kommunu

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, hevur í dag fingið svar frá Karup kommunu uppá skrivið, ið hann sendi teimum í síðstu viku. Í brævinum boðaði landsstýrismaðurin Karup kommunu frá, at eitt tilboð til børn við atferðar- og tilknýtingartrupulleikum er á veg, og at ein kunngerð er komin í gildi, sum ger tað møguligt hjá donskum myndugleikum at plasera børn í Føroyum.

Hans Pauli Strøm heitti á Karup kommunu um at umhugsa at ganga ynskinum á møti um, at Petur kann verða verandi í Føroyum. Landsstýrismaðurin legði í brævinum dent á, at Petur í Føroyum kann varðveita samband við síni systkin og sína familju í Føroyum.

Karup kommuna hevur avgjørt ikki at ganga hesi áheitan frá landsstýrismanninum á møti. Kommunan grundgevur avgerð sína við, at út frá danskari lóggávu er kommunan noydd til at síggja støðuna hjá Peturi í mun til støðuna hjá pápanum, ið býr í Karup kommunu.

Av tí at Karup kommuna hevur avgerðarmyndugleikan í málinum, kann landsstýrismaðurin ikki gera meira. Landsstýrismaðurin kann ikki áleggja donsku kommununi at broyta avgerðina.

Hans Pauli Strøm sigur, at arbeiðið við at seta ætlanina í verk við at skipa ein nýggjan stovn í Føroyum til børn við atferðar- og tilknýtingartrupulleikum tó heldur áfram.